Sosialurin

# Skemt 2010

## hjá Óla P útkomin







**Tann 22. bókin í Skemtrøðini** við tekningum hjá Óla P er nú at fáa í bókasølunum kring landið. Skemt 2010 fevnir um tekningar, sum hava verið á baksíðuni í Sosialinum hetta seinasta árið. Haraftrat er bókin eisini merkt av, at listamaðurin og teknarin er vorðin 75 ár. Í bókini eru ummæli og greinar um listina hjá Óla P. Eisini er heilsan frá mentamálaráðharranum.







Útgevari er Sosialurin, sum eisini hevur sett bókina upp. Føroyapent hevur staðið fyri prenttilgerðini.